LM-099/2023

Fylgiskjal 5

Annika Petersen

Fra: Triang <triang@olivant.fo>
Sendt: 15. februar 2024 10:04
Til: VMR-Journal; Herálvur Joensen; Sólrun Gleðisheygg
Emne: HOYRINGSSVAR til Uppskot til Løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu (Ferðavinnulógin)

Til Uttanríkis- og vinnumálaráðið
att. Høgni Hoydal.

HOYRINGSSVAR.

Vísandi til Uppskot til Løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu (Ferðavinnulógin):

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar? Lógaruppskotið verður ikki mett at hava aðrar avleiðingar enn tær, ið eru nevndar omanfyri.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum.

Hesar "metingar" hjá UVMR jf. 2.16 eru púra skeivar.
Tað verður heldur ikki grundgivið, hví ongar aðrar avleiðingar eru, t.d. skattligar.

Tað framgongur av 3. kapitli: Serligar viðmerkingar, undir serligar viðmerkingar til § 14: "Partur bygda av náttúrugjaldinum verður latin serstøku nevndini eftir § 7, stk. 1, at umsita til átøk og trivnað á staðnum. Peningurin verður í fyrstu atløgu goldin kommununi, sum síðani 19 / 21 letur bygdini ella bygdunum sín lutfalsliga part. Hetta kann gerast við at seta pening á kontu, markað til ávísu bygdina og gjalda út so hvørt, peningur verður brúktur. **Tann parturin av inntøkuni, sum verður latin eigarum og brúkarum, t.e. høgum, verður latin uttan treytir.** Peningurin verður eina ferð um árið goldin annaðhvørt hagastýrinum ella festaranum beinleiðis. **Í seinna førinum skal peningurin sostatt ikki rindast á festikontu".**

Eg skal vísa til Bali's new tourist tax starts this week: Where else will you have to pay to enter in 2024? | Euronews
Har stendur m.a. soleiðis viðv. Bali: "local residents suffer as property becomes unaffordable due to landlords buying up holiday lets".

Danmark - og nógv onnur lond - hava "grundskyld"- skattur, sum er ein árligur skattur, sum skal gjaldast av eigaranum av einum jarðateigi, alt eftir eftirspurninginum í umráðnum, tí hann er virðisøktur av øðrum (samfelagið) enn eigaranum sjálvum.

Hetta er gjørt m.a. fyri at forða inflatión, og at ognarleys eisini kunnu hava ráð at leiga ella keypa sær býli.

Danska samfelagið vil við hesum skatta tey virði, sum eru íkomin av eftirspurningi.

Hetta uppskotið hjá tykku gongur beint mótsattan veg, av tí nú íkomnu øktu ferðamannavinnuni, har landið Føroyar beinleiðis innkrevur 150 kr. frá teimum ferðandi,

LM-099/2023

og útlutar 25 % af teimum áløgdu ferðamannaskattum, sum koma til landið frá útlendingum, beinleiðis til hesi fáu, sum eru eigarir/uppisitarir.

Á hendan hátt verður tað betri hjá hesum fáu, enn at eiga pengar í bankanum, tí áður hevði uttangarðsfrælsið eitt ávist virði í mun til tað kjøtið, sum fekst av seyðinum, men nu fæst eisini ein samsýning frá landinum fyri at ráða yvir somu rættindum.

Einans tí, tey hava rættindi ella frælsi í hagunum, og sjálvt um tey t.d. búgva í Havn ella uttanlands.
Tá so talan er um kongsjørð, er tað marghátttliga enn meira sjónskt, tí ein festari letur eitt symbolskt, lítið árligt gjald fyri leigu, men kann við hesum vinna sær túsund ferðir meira frá landinum, einans við at vera skrásettur sum festari.

Hettar fer at seta gongd í eina púra ótálmaða inflatión.

Hetta uppskotið fær, um tað kemur ígjøgnum, víttrøkkandi avleiðingar innan bæði skattaumráðið og fíggjarumráðið sum heild, og í tí sosiala umhvørvinum, við tað at inflatiónin fer at økjast uttan fyrilit, og at gjógvin millum ognarleys og eigarar / uppisitarar økist munandi.

Vanliga roynir eitt land at minka um gjónna millum rík og fátak, men vinnur hetta uppskotið fræma, ger tað tað nærum óliviligt hjá tí, sum ikki eigur jørð, at liva á smáplássum.

Ikki ólíkt støðuni, sum var í ótespuliga bóndasamfelagnum her á landi, og har tey ognarleysu gjørdust trælir hjá bóndunum, ella tíðum noyddust at flyta til Havnar.

Eg kann ikki ímynda mær, at tað er hettar, Høgni Hoydal hevur ætlað við uppskotinum "hjá sær", men at embætismenninir bara ikki hava dugað at sæð avleiðingarnar av teimum 25 % til tey, sum "eiga" frælsi í hagunum.

Sjávsagt skal tað samlaða gjaldið fara til samfelagið, og í hesum førinum til tey samfeløg, sum eru úsett fyri tey negativu árinini, sum ferðavinnan hevur við sær, og soleiðis at tað vera tey, sum ikki hava møguleika at vera "eigarir", men sum eisini kenna ampa av einum ovurstórum ferðafólkastreymi, sum á annan hátt kann betra um livikor teirra, so sum er nevnt í linki, sum eg havi víst til.

Eitt frælsi gerst sostatt til eina "statsobligatión" við einum tryggjaðum avkasti av kjøti, men haraftrat til ein peningaligan vinning uppá 25 % av ferðamannaskattinum, goldin beinleiðis úr landskassanum.

Eg standi spyrjandi, hvussu tað ber til, at eitt so socialt samfelagsskaðiligt uppskot í heila tikið er sloppið ígjøgnum eftirkanningina hjá lógartænastuni.

Vinaliga
Jóannes í Dali